# Til lærararan

Undirvísingargongdin til bókina *Rimarúmið*
er ætlað sum íblástur til lærarar og næmingar.




**Rimarúmið**

**Elin Michelsen**

Bókadeild Føroya Lærarafelags, 2021

Asta Wolles, Eilen Anthoniussen,
Emmy Joensen og Gunvá Magnussen

Nám 2022

## Endamál

Endamálið er at lesa skaldsøgur, har næmingarnir fáa eina góða lesiuppliving, bæði við at lesa sjálv, lesa upp, lesa saman við øðrum og hoyra upplestur. Endamálið er eisini at menna førleikan at grunda um innihaldið og viðgera skaldsøgur sum  tekstslag og seta í frásjón.

## Næmingafortreytir

Væntað verður, at næmingarnir duga at lesa, lurta og skilja innihaldið í tekstinum.

Væntað verður, at næmingarnir duga at arbeiða sjálvstøðugt og í bólki og duga at leggja fram á ymiskan hátt.

## Um bókina

Skaldsøgan *Rimarúmið* kom út í 2021 og er um 15 ára gomlu gentuna Tóru. Tóra er komin í ein hulduheim ímóti sínum vilja. Hon veit heldur ikki, hví hon er endað her. Tóra veit, at hon hevur gjørt okkurt galið, men hon minnist ikki, hvat tað er. Hon endar í einum skúla, sum hon ongantíð

©Nám

hevur hoyrt um og skal nú liva saman við fólkum, sum hon aldrin hevur sæð ella hoyrt um fyrr. Hesi fólkini eru nógv øðrvísi enn fólk, sum hon vanliga var saman við. Tey duga meira enn at mata seg og gera ymiskt, sum eingin eigur at duga.
Í fyrstani kennir Tóra seg ikki aftur í fólkunum í skúlanum, men sum tíðin líður, fer hon so smátt at ivast í, um hon eisini er, sum tey eru.
*Rimarúmið* er fyrsta bókin í røðini um Tóru og hennara stremban eftir at finna út av, hvør hon er í einum heimi, sum Tóra ikki ánaði var til.

## Arbeiðshættir

Næmingarnir fara at arbeiða sjálvstøðugt, í bólki og í flokshøpi, bæði munnliga og skrivliga. Allir næmingar skulu lesa skaldsøguna, men tað kann gerast á ymiskan hátt. Skiftast kann ímillum sjálvstøðuga lesing í skúlanum og heima, parlesing, bólkalesing og upplestur frá lærara ella næmingum.
Uppgávurnar eru skipaðar eftir leistinum *áðrenn tit lesa*, *meðan tit lesa* og *tá ið tit hava lisið*. Uppgávurnar eru skipaðar sum flokssprát, einstaklingauppgávur, makkarauppgávur og bólkauppgávur. Uppgávurnar til Rimarúmið eru ætlaðar 7. – 9. flokki.

Tíð: Vit meta, at arbeiðið við bókini Rimarúmið og uppgávunum tekur 15-20 undirvísingartímar umframt heimaarbeiði.

Vit mæla til, at lærarin lesur fyrsta part, "Ein leyvungi í vátum skóm", fyri næmingunum. Hetta er fyri at geva øllum næmingum somu inngongd til søguna, tí tað kann kennast summum tungt at byrja eina bók.
Tosa við næmingarnar um byrjanina og tað, tey fáa at vita í fyrsta parti.

Niðanfyri verða nøkur faklig førleikamál lýst, sum arbeiðið við bókini *Rimarúmið* kunnu fata um. Lærarin avger altíð, hvørji faklig førleikamál dentur verður lagdur á.

©Nám

## Førleikamál

Undirvísingargongdin til *Rimarúmið* leggur upp til, at næmingarnir fáa høvi at stimbra og menna hesar fakligu førleikar:

- *at lesa raðið og skilur tað, sum lisið verður, og dugir at grunda um innihaldið*
- *at gera metingar og niðurstøður um ymiskt, sum næmingurin hevur sæð, hoyrt og lisið og grundgeva fyri egnum sjónarmiðum*
- *at orða seg rætt og greitt og nýta málið sum amboð í samrøðu, samstarvi og framløgu*
- *at nýta viðkomandi samskiftishættir og grundgevingarhættir eftir endamáli og samskiftisstøðu*
- *at nýta hóskandi lesisnildir grundandi, her ímillum at snarlesa, nærlesa og punktlesa*
- *at greina, tulka og seta í frásjón ymisk fagurbókmentalig tekstsløg*

(úr námsætlanini fyri føroyskt).

## Um rithøvundin

Elin Michelsen hevur skrivað bókina *Rimarúmið*. Hetta er fyrsta bókin eftir Elina. Hon er útbúgvin innan samskifti og starvast í Kringvarpi Føroya. Í uppvøkstrinum dámdi Elini væl at lesa, serliga var hon hugtikin av bókum um ævintýrligar verur.

Í sendingini Nón 8/11-21 er samrøða við Elina Michelsen um *Rimarúmið*. Møguleiki er at lurta eftir samrøðuni á heimasíðuni hjá Kringvarpinum Nón | Kringvarp Føroya (kvf.fo)

## Áðrenn tit lesa

- Hyggið at permumyndini og lesið baksíðutekstin og tekstin í klaffunum.
- Tosið saman um, hvat bókin man fara at snúgva seg um.
- Hvat vita tit um rithøvundin?

Hyggið fyrst at permumyndini og bið síðan næmingarnar gera sær tankar um, hvat bókin man vera um. Tit kunnu tosa um sjálva tekningina, um litirnar, persónin á tekningini, skrift, hví bindistrika er í heitinum o.a.

Lesið síðan baksíðutekstin og tosið um, um tit á permumyndini sóu tað, sum bókin er um.
Í klaffunum inni í bókini fáa tit meira kunning, og tað er gott at fáa við, áðrenn tit lesa bókina.

©Nám

## Meðan tit lesa

- Havið ein blýant og pappír við hondina og skrivið niður, so hvørt sum tit støðga á við eitthvørt, sum tit ivast í ella skulu minnast.

Endamálið við hesum er:

  - at næmingarnir venja at støðga á við ókend orð, men ikki støðga upp
  - at næmingarnir velja einstøk orð, sum tey skriva niður, við tí fyri eyga at kanna orðini nærri og soleiðis skilja týdningin
  - at næmingarnir kunnu sita saman við einum makkara og umrøða orðini. Ofta er gott at hava floksprát um trupul orð, sum næmingarnir vísa á
  - á sama hátt kunnu tey skriva niður eitthvørt, sum tey undrast á ella halda vera áhugavert.

- Skrivið stuttan samandrátt av hvørjum kapitli, møguliga sum stikkorð.

Hetta hjálpir næmingunum at minnast, hvat hvør kapittul er um. Tað lættir eisini um, tá ið tey eru liðug at lesa bókina og skulu arbeiða við henni.

- Tosið í flokkinum um, hvussu hesin tykisheimur er.

## Tá ið tit hava lisið

**Frásjónargerð**

Í hesum brotinum skulu næmingarnir arbeiða við at seta í frásjón. Spurningarnir snúgva seg um at knýta eina nútíðar ungdómsskaldsøgu at bæði sagnum og fantasy skaldskapi.

Tosið saman í flokkinum um *Rimarúmið*:

- Hvat vita tit um huldufólk í føroyskum sagnum?
- Hvat vita tit um tekstslagið fantasy?
- Kenna tit aðrar søgur, sum minna um søguna um Tóru?

Gott hugskot er at tosa við næmingarnar um, hvat føroyingar hava hildið um huldufólk, og hvussu huldufólk hava ávirkað føroyingar upp ígjøgnum tíðina. Á snar.fo/sagnir eru nógvar sagnir, kanska er onkur staðbundin søgn um huldufólk, sum tit kunnu tosa um.

**Viðkomandi bókmentir**

Eyðun Andreassen: *Úr søgn og søgu.* Í bókini verður m.a. greitt frá um huldufólk, sí partin, sum eitur “Sterkar duldar maktir”. Bókin finst teldutøk á Google Books.
Turið Sigurðardóttir: *Hugtøk í bókmentafrøði.* Bókin fæst teldutøk á unguforoyar.fo

©Nám

# Evni at arbeiða við

### Persónar

## Tóra

- Hvør er Tóra?
- Lýs hana.
- Hvat man vera hent við Tóru?
- Hvat munnu marrudreymarnir snúgva seg um?
- Hvat man vera hent við foreldrum hennara?

## Billa

- Lýs Billu.
- Hví man Billa altíð borðreiða við te?

## Heri

- Lýs Hera.
- Hvussu er Heri áðrenn og aftaná, hann er fjøtraður?

- Vel ein persón, tú kundi hugsað tær at arbeitt við.

Mælt verður til, at øll lýsa Tóru og minst ein persón afturat.

### Umhvørvið

- Lýs umhvørvið - náttúruna, skúlan, hølini o.s.fr.
- Hvussu upplivir Tóra skúlan? (Tekstbrot á s. 10)
- Hvat merkir markið millum skúlans økið og restina av oynni? (Tekstbrot á s. 63)

### Tíð

- Hvussu langa tíð spennir søgan um?
- Nær fer søgan fram? Hvussu kemur hetta til sjóndar? Haldið eyga við t.d. málburði, tøkni, klædnastíli o.ø.

# Orð og stílur

- Hugleiðið um hesi orð og tosið um týdningin av teimum:
    - Rimarúm (s. 110-111)
    - Fjøtur (s. 121)
    - Hugabond (s. 121)
    - Ljómur (s. 217)
    - At snøra (s. 199)
    - Gávur (s. 56). Hvat merkja gávur í hesum høpi?

- Lesið brotið á s. 120-122 og tosið um, hvussu fjøtrið riggar.
- Røddin, sum viðmerkir tað, Tóra sigur og ger. Hvønn leiklut spælir hon fyri frásøgnina?

©Nám

Tit kunnu m.a. tosa um, hví tað altíð stendur í kursiv. Hevur tað ein serligan týdning, tá ið tit lesa? Man rithøvundurin vilja nakað ávíst við at skriva í kursiv? Fær røddin størri týdning, tí at hon er skrivað í kursiv?

## Aðrir spurningar at taka upp:

- Hvussu fær Tóra atgongd til rimarúmið?
- Hvussu endar bókin?
- Hvat hendi við Eleonoru, tá hon datt?
- Hvat hendi við Tóru, áðrenn hon byrjaði á skúlanum?
- Hvat vænta tit fer at henda í næstu bók um Tóru?

Næmingarnir kunnu skriva eitt stutt brot, har tey koma við hvør sínum uppskoti um, hvussu tað fer at gangast Tóru í næstu bók.

*Í Strok* er eitt ummæli av bókini *Rimarúmið*, sum 13 ára gamla Ranja Eir Gudmundardóttir hevur skrivað. Farið inn á strok.fo og síðan ummælið, so finna tit ikki bara ummælið av *Rimarúminum*, men eisini nógvum øðrum bókum. Næmingarnir kunnu lesa ummælið og tosa um, um tey eru samd ella ósamd við Ranju Eir.

©Nám

## Meðan tú lesur

Tá ið tú lesur og kemur fram á orð, sum tú ikki kennir frammanundan, skalt tú minnast til at skriva tey niður og skriva hvørjari síðu tey eru á.

| Orð | á síðu | Orð | á síðu |
|---|---|---|---|
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |

©Nám